# Magnus Heinason – Túrfrágreiðing
# Roynd við skiljirist. Túrur nr. 1644
# Tíðarskeið: 19/10-31/10 - 2016

**Fólk við frá HAV:** Jens Arni Thomassen og Mourits Mohr Joensen

Á**byrgd:** Luis Ridao.

**Endamál:**
Høvuðsendamálið við royndini var at kanna, hvussu væl ristin skilir smærri fisk frá størri fiski. Øll veiðan varð kanna, so til bar at samanlíkna alla veiðuna.

**Reiðskapur:**
Stjørnutrol 470 ♯ við 135 mm posa, rockhopper grunnur, 60 m breitlar og Sea-Hunter semi-pelagiskar 7 $m^2$ trolhurðar frá ROCK í Vági.
Ristin varð sett í eina sonevnda ristsektión, ið varð sett millum millumstykkið og bellin. Støddin á ristini var 1,75 m hædd x 1,24 m breidd, 55 mm vóru millum rimarnar.
Vinkulmátari varð settur á ristina.

**Prøvatøka:**
Veiðan varð øll longdarmátað og vigað.
Íalt vórðu 49 tóv, av teimum vórðu 46 uppgjørd.
Øll fiskasløg vórðu mátað og vigað.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 19. oktober kl. 21.00.
25 tey fyrstu tóvini vóru norðanfyri, frá Viðoynni og eystur um Fugloynna, hetta fyri at fáa blanding av toski, hýsu og upsa.
6 hál vóru tikin djúpari, norður úr Mýlingi.
Fyrstu 25 tóvini vóru í 2 tímar.
Haðani fóru vit suður úr Svínoynni, Nólsoyarbankan og Sandoyarbankan, har vit høvdu 24 tóv, 4 tímar hvørt.

Vinkulmátarin riggaði væl, og lá ristin nógv um 30°.

Fyribils sær út til, at ristin skilir væl. Tað var meira av smáari hýsu og smáum upsa í trolinum við ongari rist enn í trolinum við rist.
Endalig frágreiðing verður ætlandi liðug 15. december 2016.

Vóru aftur á Havnini 31. oktober kl. 21:45

Mourits Mohr Joensen